FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn

27. oktober, 2023

Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

J.C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. +298 352 500
Fax +298 352 501

setur@setur.fo

www.setur.fo

Hoyringarsvar frá Fróðskaparsetri Føroya í sambandi við uppskoti til lóg um Kervi+ (Mál nr. 23/03209)

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur sent Fróðskaparsetri Føroya til hoyringar uppskot til lóg um Kervi+. Hoyringarfreistin er 27. oktober, 2023.

Dátuverndarfólk Setursins, Jens Christian Olsen/Eirin, skrivaði uppskot til hoyringarsvar, sum hetta skrivið er grundað á.

Viðmerking til § 1, Stk. 2
Tað kann gerast ein trupulleiki hjá dátuábyrgdaranum, sum biður um upplýsingar, sum kunnu vera bæði viðkvæmar og vanligar upplýsingar, um bæði reglur um brúkarar og atgongd til persónupplýsingar verða broyttar av landsstýrisfólkinum. Mælt verður til, at tað gerst púra greitt í lógini, at ábyrgdin fyri eini møguligari broyting í reglum um brúkarar og atgongd ikki á nakran hátt verður ført aftur til dátuábyrgdaran, sum á fyrstu tíð bað um persónupplýsingarnar.

Hetta, at landsstýrisfólkið seinni kann broyta bæði “reglur um brúkarar, atgongd til Kervið+ og um dátuflutning” ger tað sera trupult hjá dátuábyrgdaranum at áseta grund fyri at biðja um upplýsingarnar frá fólkum, tí hesar grundir kunnu broytast av landstýrisfólkinum.

Dátuábyrgdarin skal eisini tryggja: trygd, atkomu og integritet av persónupplýsingunum, men sambært hesum kann landsstýrisfólkið broyta hetta við at áseta “reglur”.

Mælt verður til at nágreina hetta í lógaruppskotunum, so eingin ivi er um rættindini hjá skrásetta.

Viðmerking til §3, Stk. 2
Fróðskaparsetur Føroya mælir til, at tað verður gjørt greitt í lógini, at tað skal bera til at krevja av Undirvísingarstýrinum at fáa eina dátuviðgerðaravtalu frá Undirvísingarstýrinum, sum líkur ES-krøvini, tvs. at Undirvísingarstýrið brúkar “Standard dátuviðgerðaravtalan”, sum er á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og ikki einans “stytt útgáva”.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Dátuverndarfólkið hjá Fróðskaparsetri Føroya hevur kunnað Setrið um júst hesa avbjóðingina, sum fleiri dátuviðgerðar hava við Gjaldstovuna (Talgildu Føroyar/Vangin), har Gjaldstovan ikki brúkar "internationalu" útgávuna av dátuviðgerðaravtaluni. Um Undirvísingarstýrið ger sum Gjaldstovan og ikki brúkar longu dátuviðgerðaravtaluna – helst fyri at sleppa undan fleiri av ásetingunum sum longra dátuviðgerðaravtalan hevur til dátuviðgeran enn stutta dátuviðgerðaravtalan – so verður tað av dátuverndarfólkinum mett trupult hjá Setrinum at brúka Kervi+. Um hetta verður lýst greitt í lógini, vil hetta eisini verja sjónarmiðið hjá minnu skúlunum, sum kanska ikki hava somu "tyngd" sum størru útbúgvingarstovnarnir.

Fróðskaparsetur Føroya hevur nógvar ES-borgarar skrásettar hjá Setrinum, og tí er neyðugt, at Setrið kann vísa á, at ásetingarnar í GDPR eisini verða hildnar. Longra dátuviðgerðaravtalan er góðkend av danska Dátueftirlitinum, meðan stutta dátuviðgerðaravtalan ikki er góðkend internationalt. "Stytt útgáva" er góðkend av føroyska Dátueftirlitinum og er tí í lagi at brúka til skráseting av føroyskum persónum, men hon er ikki nøktandi hjá Fróðskaparsetur Føroya til eina skipan sum Kervi+.

Vísandi til, at Setrið er kunnað um trupulleikan hjá fleiri dátuábyrgdarunum um at fáa internationalt góðkendu dátuviðgerðaravtaluna frá Gjaldstovuni, verður mælt til, at hetta kann loysast við eini áseting um hetta í lógini.

Viðmerking til §3, Stk. 3
Sum víst á fyrr hevur Fróðskaparsetur Føroya nógvar ES-borgarar skrásettar í skipanini, bæði sum lesandi og granskarar/undirvísarar, og tí er neyðugt, at Setrið kann vísa á, at ásetingarnar í GDPR eisini verða hildnar. Longra dátuviðgerðaravtalan er góðkend av danska Dátueftirlitinum, meðan stutta dátuviðgerðaravtalan ikki er góðkend internationalt. "Stytt útgáva" er góðkend av føroyska Dátueftirlitinum og er tí í lagi at brúka til skráseting av føroyskum persónum, men hon er ikki nøktandi hjá Fróðskaparsetri Føroya til eina skipan sum Kervi+. Vit mæla tí til, at um landsstýrisfólkið ger eina lóg, sum hevur somu ásetingar sum ein dátuviðgerðararavtala, at støði verður tikið í longru dátuviðgerðaravtaluni sum hevur tær ásetingar til dátuviðgeran, sum longra dátuviðgerðaravtalan hevur, tvs at henda at henda lógin tekur hædd fyri altjóða ásetingum fyri dátuvernd av m.a. ES-borgarum.

Viðmerking til §4, Stk. 1
Mælt verður til at vera meira konkret í lógartekstinum. Í tekstinum stendur, at Undirvísingarstýrið kann nýta persónupplýsingar úr Kervi+ "til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlunum, til eftirlit, v.m." Hvat merkir v.m.? Er tað ein "blankokekkur" til Undirvísingarstýrið at gera, hvat tey vilja við persónupplýsingarnar? Hvar setur hetta dátuábyrgdaran, sum hevur biðið um persónupplýsingarnar til eitt ávíst

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

endamál? Hvar setur hetta tann skrásetta, sum hevur latið upplýsingarnar til eitt ávíst endamál?

Viðmerking til § 4, Stk. 2
Mælt verður aftur til at vera meira konkret í lógartekstinum. Í tekstinum stendur aftur, at Undirvísingarstýrið kann nýta persónupplýsingar úr Kervi+ "til umsiting av Kervi+, umsiting av skúlunum, til eftirlit, v.m." Hvat merkir v.m.? Hvar setur hetta dátuábyrgdaran, sum hevur biðið um persónupplýsingarnar til eitt ávíst endamál?

Vegna Fróðskaparsetur Føroya

Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri